LIST

# Mánalýsi í Víngarðinum

**Danska listakvinnan, Julie Sass hevur verið í Føroyum, her hon hevur arbeitt í Steinprenti og latið eina nýggja framsýning upp í Víngarðinum í Havn.**

Kinna Poulsen

Tað var síðsta leygardag, at nýggja framsýningin hjá Julie Sass, I LET DIFFERENT LIGHT IN hjá Julie Sass læt upp í Víngarðinum. Her framsýnir listakvinnan málningar, verk á pappíri og kollasjur. Framsýningin tekur støði í mánalýsi og skugga og teim serligu litum, sum vit síggja í mánalýsi. Myndirnar eru abstraktar og dynamiskar við ferð á strokunum. Samstundis sum máliprosessin tykist spontan og vill, eru myndirnar merkt av gjølligari umhugsan – tú fært varhugan av einum serligum neyvleika í onkrum, ið samstundis er eins og ein ferð í tí ókenda. Hetta eru verk, tú kanst hyggja leingi eftir. Tá varnast tú hvussu sterkur myndabygnaðurin er, hvussu skroypilig javnvágin er.

## Øðrvísi ljós

Litirnir eru tónaðir niður – tað er eins og vit uppliva eitt samdrigið árin við onkrum, ið brádliga kemur til sjóndar í myrkrinum. Í framsýningarheitinum staðfestir listakvinnan, at hon letur eitt øðrvísi ljós inn í myndirnar. Við tað, at svart er høvuðslitur í myndunum á framsýningini tykist orðingin øvug; sum kunnugt er svart fullkomiliga fyriuttan ljósvirði. Ljósið upp móti tí svarta verður silvurkent sum mann kann uppliva tað eina fullmánanátt. Ymsastaðni hómast dreymakendar eftirmyndir av landsløgum, ið minna um tær um somu tíð serstakliga neyvu og abstraktu tekningarnar og tekstirnar í artistbókini, Vandretilstande, sum í vár varð løgd fram í Listasavninum. Í sambandi við samrøðu við listakvinnuna las hon eisini upp úr bókini síðsta sunnudag.

## Listakvinnan

Julie Sass hevur tikið lut á mongum framsýningum her á landi saman við m.a. føroyskum listafólkum t.d. Ólavsøkuframsýningini í Listasavninum, í Norðurlanda-húsinum á listaeventinum á G!Festivalinum og í Steinprenti, eins og hon hevur samstarvað við føroysk listafólk eitt nú sum kurator. Listakvinnan hevur í skjótt tíggju ár samstarvað við Steinprent, har hon hevur framleitt nógv prent og bøkur. Hon er fleirtáttað listakvinna, sum fæst við málningalist, tekstil og grafikk, eins og hon hevur kurateráð framsýningar, eisini onkrar, har føroysk listafólk hava verið umboðað. Julie Sass er útbúgvin á Det Kongelige Danske Kunstakademis Billedskoler og New York University (MFA). Hon hevur givið út fleiri bøkur og hefti m.a. í sambandi við framsýningar, hon hevur kurateráð umframt artist books m.a. Volume Rhythm Matter og Lemon Mood, sum báðar eru framleiddar í Steinprenti og eru partar av savninum hjá The MET í New York. Fyri kortum kom bókin Image: Temporary Constellation, har ymiskir høvundar, listafólk, kuratorar og onnur skrivað um útvald verk hjá Julie Sass. Framsýningin er opin hósdag16-21 og fríggjadag og leygardag frá 16- 01 fram til 28. januar komandi ár.





## LIST







